# STUÐUL

## Minnisgrunnur Sonnu av Skarði

Á hundrað ára føðingardegi Sonnu av Skarði tann 19. apríl 1976 stovnaði Tórshavnar kommuna „Minnisgrunn Sonnu av Skarði“.

Endamál grunsins er at menna og lívga føroyskt handarbeiði, føroyska handarbeiðsmentan og veita fólki, sum fáa sær handarbeiðsútbúgving í tóvirki (tekstil) fíggjarligan stuðul.

Tygum fáa meiri at vita um minnisgrunnin frá Jákupi Simonsen, mentamálaleiðara, telefon 30 20 10.

Umsókn við upplýsingum um útbúgving og framtíðarætlanir í tóvirkis-útbúgving skal sendast Tórshavnar kommunu, postrúm 32, FO-110 Tórshavn, í seinasta lagi fríggjadagin 10. juni 2011. Merkið umsóknina „Minnisgrunnur Sonnu av Skarði“.

## Sanglegat

Sanglegatið til minnis um Sonnu Dahl Waagstein letur stuðul til sangarar, sum hava víst serstakar gávur, og sum ætla at útbúgva seg meira í solosangi.

Meiri fæst at vita um stuðulin frá Jákupi Simonsen, mentamálaleiðara, telefon 30 20 10.

Umsóknir skulu sendast nevndini í seinasta lagi fríggjadagin 10. juni 2011. Sanglegatið til minnis um Sonnu Dahl Waagstein, Postrúm 32, FO-110 Tórshavn.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# GRINDABÁTAR

## Havnakenningartekin

Í „Kunngerð um grind“ frá 8. apríl 1998 er ásett í §3 stk. 3, at: „Bátur, sum fer í grind, skal verða merktur við havnakenningartekini“.

Nevnda „havnakenningartekin“ er tí ein fyritreyt fyri at fara í grind við báti og fyri at vera við í einum grindaskifti.

„Havnakenningartekin“ fæst ókeypis við at venda sær til: Føroya Skipaskráseting, Sigmundargøta 13, postboks 1178, 110 Tórshavn, tlf. 35 15 00.

**STREYMOYAR SÝSLA,** hin 10. mai 2011

Finnbogi Midjord

sýslumaður

Mannagongd fyri hvussu eitt grindadráp verður skipað í Tórshavn liggur á heimasíðu kommununnar www.torshavn.fo. Fyrisitingin hjá Tórshavnar kommunu samstarvar við sýslumannin, sum er myndugleikin á økinum, og grindaformenninar, um mannagongdir og skipan av grindadrápinum.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Leiðari til Býarbókasavnið

www.torshavn.fo

## Søkt verður eftir býarbókavørði í Tórshavnar kommunu

Býarbókasavnið hevur ein týðandi leiklut í gerandisdegnum hjá fólki í býnum, ungum sum eldri. Sum mentanar- og kunningardepil í miðbýnum og við tænastum um talgildu miðlarnar skal Býarbókasavnið áhaldandi mennast og verða ein fjøltáttaður, nýskapandi, sjónligur og virkin stovnur, ið røkkur út um vanliga bókasavnsvirksemið.

Býarbókasavnið varð stovnað 1. apríl 1969. Bókasavnið hevur tríggjar deildir, barnabókasavn, útlán fyri vaksin og lesistovu. Á bókasavninum eru 14 starvsfólk.

Hølini hjá býarbókasavninum eru víðkað og broytt, soleiðis at ein partur av bókasavninum nú er í veghæddini við kaféumhvørvi, sjálvgreiðslu, teldum v.m.

Meira fæst at vita um Býarbókasavnið á heimasíðuni www.bbs.fo.

**KOMMUNAN BJÓÐAR**
eitt áhugavert starv við fjølbroyttum og mennandi uppgávum og avbjóðingum.

**NAKRAR AV HØVUÐSUPPGÁVUNUM ERU:**
- at leiða og hava ábyrgd av dagliga virkseminum á býarbókasavninum
- at tryggja eitt tíðarhóskandi, mennandi og dygdargott umhvørvi
- at tryggja, at býarbókasavnið støðugt mennir og skapar nýggjar tænastur og nýtt virksemi samsvarandi tørvi ella møguleikum
- at tryggja, at bókasavnið hevur fullgóða fíggjarstýring og fremur úrslit
- at fylgja við og kunna seg um menning á økinum

**FØRLEIKAKRØV**
- Bókavarðarútbúgving frá viðurkendum norðurlendskum bókasavnsskúla ella akademiska bókavarðarútbúgving frá lærdum háskúla
- Royndir í bókasavnsarbeiði
- Royndir í leiðslu og samstarvi
- Góður teldukunnleiki og áhugi fyri kunningartøkni

**PERSÓNLIGIR EGINLEIKAR**
Umráðandi er, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er fyrikomandi, dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis og kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar. Neyðugt er at hava hugsjónir um virksemið á bókasavninum og kunna ganga á odda.

**SETANARVIÐURSKIFTI**
Starvið er eitt fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**UMSÓKN**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 26. mai 2011 kl. 12.

**MEIRA FÆST AT VITA**
Les meira um starvið og útgreinaðan starvsprofil á starvstorginum á www.torshavn.fo. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jákup Simonsen, mentamálaleiðara, ella Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóra, á telf. 302010.

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER HØVUÐSSTAÐARKOMMUNA.** Í kommununi starvast tilsamans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava ein nútímans leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk og raðfesta innanhýsis samskifti og samskifti við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA